## HDYGD fingið nýggjar eigarar



Vatnsoyra Snikkaravirki og Føroya Gluggi hava fingið nýggjar eigarar. Eitt partafelag við Jónberg og Jóhan á Mýrini og Poul Poulsen hevur keypt feløgini, sum saman kalla seg fyri HDYGD. Tað eru Vatnsoyra Snikkaravirki, sum framleiðir úr træ og Føroya Gluggi sum framleiðir úr plasti og móðurfelagi pf. 278. Virksemi hjá Vatnsoyra Snikkaravirki byrjaði í 1968. Føroya Gluggi, sum byrjaði við plastframleiðslu í 1984, varð keypt av Vatnsoyra Snikkaravirki í 1990. Feløgini fingu felags virkis- og vørunavnið HDYGD í 2005. Hetta navnið og búmerkið hóskar rættuliga væl og hevur sligið væl ígjøgnum. Virksemið hjá HDYGD er í støðugum vøkstri. Føroya Gluggi hevur júst útbygt framleiðslubygning sín, so hølini eru tvífald so stór. Íløtuni arbeiða 25 fólk á virkinum, og hesi hava øll fingið bjóða at halda fram í størvunum.

# Tveir tiknir í narkomálinum

**Í sambandi við stóra narkomálið, sum í gjár førdi til, at hald varð lagt á rúgvu av amfetamini, hevur løgreglan framt húsarannsóknir í Føroyum**




NARKO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár visti Portalurin at siga, at íslendska løgreglan hevði lagt hald á eina rúgvu av amfetamini umborð á einum báti. Talan er um eina stóra og umfatandi kanning, sum l-greglurnar í Føroyum, Íslandi, Danmark og Noregi hava samstarvað um.

Løgreglan í Føroyum hevur framt fleiri húsarannsóknir, og í tí sambandi eru tveir mans í tjúgunum handtiknir og koma í grundlógarforhoyr seinni í dag. Løgreglan legði í hesum sambandi hendur á tvey kilo av hørðum rúsevnum, sum tað eitur í tíðindaskrivi frá løgregluni.

Annars er ógvuliga smáligt við upplýsingum, tí løgreglan vísir til, at eitt umfatandi kanningararbeiði framvegis verður gjørt, og fyri ikki at órógva hetta, verður hildið tætt.

Málið hevur verið kannað í samstarvi millum løgreglurnar í fleiri europeiskum londum og serliga í seinastuni í samstarvi millum Føroyar, Ísland og Danmark, verður upplýst av politistøðini.

# Fíggjarmálaráðið kannar banker

**Danska Finanstilsynet hevur sent 88 brøv út til 62 bankar í sambandi við at hesir hava havt óvanliga stóran vøkstur í útlánunum seinasta árið**

EFTIRLIT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Finanstilsynet hevur til uppgávu at hava eftirlit við bankunum í danska ríkinum, og harvið eisini við føroysku bankunum.

Í hesum døgum hevur Finanstilsynet sent 88 brøv út til 62 smærri banker, har ávarað verður ímóti ov framfýsnum útlánspolitikki. Í summum forum er talan bert um ein peikifingur, meðan tað í øðrum forum er talan um, at Finanstilsynet beinleiðis krevur eina frágreiðing um, hví vøksturin í útlánunum er so ógvusligur.

Talan er kortini ikki um nakað eindømi, tí slík brøv verða send út á hvørjum ári, men talið í ár er størri enn í fjør, tá Finanstilsynet sendi 78 brøv út móti teimum 88 í ár.

Bjarne Jensen frá BJ Consult, sum eisini var nakað frammi í sambandi við børsskrásetingina av Føroya Banka, sigur við epn.dk, at talan her bert er um sunna fornuft, og at tað langt frá nýtist at vera nakað forgjørt í, um ein banki veksur mundi um útlánini.

Finanstilsynet ávarar hinvegin ímóti at leggja ov nógv fyri, tá talan er um økt útlán.

Teir báðir stóru føroysku bankarnir, Eik Banki og Føroya Banki úttala seg av prinsippiellum orsøkum ikki um viðurskifti síni við Finanstilsynet, men úr Føroya Banka verður kortini sagt, at teir ikki hava fingið nakað bræv í hesum sambandi.

Úr Eik Banka verður sagt, at samlaði vøksturin hjá teimum er 16,7%, og so kunnu folk sjálvi gera sær sínar metingar. Her skal kortini takast við, at Eik hevur víðkað munandi um sítt virksemi, millum annað við at keypad ein danskan internetbanka.

# Skapandi Spírar spretta aftur

**Verkætlanin Skapandi Spírar, har børn í Vági royni skapandi evnini innan myndlist, er nú aftur á skránni**

SKAPANDI LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í samband við, at Vágs Kommuna fyrst í oktober heldur sín 100 ára dag sum kommuna, er verkætlanin Skapandi Spírar aftur á skránni. Hear vikurnar fram til føðingardagsvikuna verður arbeitt, og so verður framsýning við myndunum, sum børnini tekna. Aggi Ásgeirsdóttir, listakvinna, er verkstaðsleiðari, tá børnini savnast at royna seg innan myndlist.

Aggi sigur, at hon m.a. roynir at varðveita ymiskleikan, ið er í teim ymsu myndunum, og so er ymiskt, ið børnini sleppa at royna, m.a. at gera sjálvsmyndir.

Tað eru eini 3 ár síðani, at verkætlanin Skapandi Spírar sá dagsins ljós á fyrsta sinni. Síðani hevur hon verið virkin av og á.

Nú hava børnini so aftur møguleikan at savnast um listina sum skapandi ítriv undir góðum umstøðum og við serkønari vegleiðing.

Í rúgvusmiklu skránni í føðingardagsvikuni hjá Vágs Kommunu fyrst í oktober er so eisini ein listaframsýning við myndunum, sum yngru borgararnir í kommununi, børnini, hava málað.



*Aggi Ásgeirsdóttir, listakvinna, er verkstaðsleiðari, tá børnini savnast at royna seg innan myndlist í verkætlanini Skapandi Spírar*

*Mynd: D. Olsen*